# Pensjónin eigur at vera almenn uppgáva

*– Hetta er ein ákæra, ið vit ikki uttan víðari ætla okkum at góðtaka. Er tað nakar, sum hevur gjørt nakað við eftirlønarspurningin, so er tað fakfeløgini. Vit hava í veruleikanum átikið okkum eina almenna uppgávu, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmanna-felagnum um úttalilsið frá Jóannisi Nielsen*



**Fleiri av stóru fakfeløgunum í Føroyum síggja tað framvegis sum eina lands uppgávu at syrgja fyri pensjónum. Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, vil heldur ikki góðtaka, at Jóannis Nielsen ákærir fakfeløgini fyri at hava sovið í tímanum.**

EFTIRLØNIR
*Heri á Rógvi*

Málið um eftirlønirnar hjá tí almennna hevur veruliga vakt ans seinastu dagarnar. Í trý ár hevur verið arbeitt við einum uppskoti um eina nýggja eftirlønarskipan. Uppskotið, sum nú loksins tykist at vera á veg, fer væntandi at innihalda eitt slag av einari kravdari eftirløn, sum skal fíggjast uttan um landskassan.

Tað var í Sosialinum í gjár, at Jóannis Nielsen, tingmaður fyri fólkaflokkin segði, at fakfeløgini hava sovið í tímanum í eftirlønarspurninginum. Hesi orð fullu tó ikki í eins góða jørð hjá øllum. Formaðurin í Starvsmannafelagnum gjørdist beinleiðis óður, tá hann las, hvat tingmaðurin hjá Fólkaflokkinum hevði at siga.

– Hetta er ein ákæra, ið vit ikki uttan víðari ætla okkum at góðtaka. Er tað nakar, sum hevur gjørt nakað við eftirlønarspurningin, so er tað fakfeløgini. Vit hava í veruleikanum átikið okkum eina almenna uppgávu, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum. Hann kallar tað eisini eina sera grova skuldseting.

Eisini forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Winther, heldur lítið um orðini hjá ting-manninum.

– Vit hava bestemt ikki sovið í tímanum. Vit kunnu eisini takka Fólkaflokk-inum fyri, at vit eru komin so langt, tí teir hava allatíðina mótarbeitt samhaldsfasta, sigur Ingeborg Winther.

## Hava longu skipan

Starvsmannafelagið, Føroya Arbeiðararfelag og Havnar Arbeiðsmannafelag hava øll tað til felags, at tey eru ímóti nýggja leistinum, sum tað verður lagt upp til í einari framtíðar eftirlønarskipan. Prinsippið er framvegis tað, at tað eru teir breiðastu herðarnir, sum eiga at taka ta tyngstu byrðuna.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at teir ganga inn fyri einari samhaldsfastari eftirlønarskipan. Føroya Arbeiðarafelagið samtykti á aðalfundi, at felagið fult og heilt tók undir við samhaldsføstu skipanini.

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Karl Johansen, vísir á, at teir nú í nógv ár hava havt sín egna eftirlønargrunn. Hetta hava eisini onnur fakfeløg gjørt, m.a. Starvsmannafelagið.

Hesin grunnur virkar í dag soleiðis, at samlað 4,8 % av lønini verður latin til grunnin. Tað er bæði arbeiðsgevarin og og arbeiðstakarin, ið gjalda til grunnin. Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag sigur, at við hesari eftirlønini umframt fólkapensjónini, so ber til at liva av eftirlønini. Tí er tað alneyðugt at vit varðveita fólkapensjónsskipanina, soleiðis at eitt sámiligt livistøði verður varðveitt, veit Karl at siga.

## Ódámligir tendensir

Óli Jacobsens, formaður í Føroya Fiskimannafelag, kallar eitt tílíkt komandi uppskot fyri at vera langt úti í FF-Blaðnum. Óli ivast eisini í, hvussu tað verður at skifta yvir til hesa nýggju skipanina, serliga tá vit í løtuni eru mitt í einum sáttmálaskeiði.

Politikarar hava víst á, at hetta fer at taka tíð at koma at virka, men fakfeløgini halda tó framvegis lítið um eitt tílíkt uppskot, sum Sámal Petur í Grund hevur víst á.

Gunnleivur kallar tað fyri ógvuliga ódámligar tendensir, og hann vísir eisini á vandin fyri, at tað solidariska heilt hvørvur.

Ingeborg Winther heldur fyri, at løgmaður veruliga skuldi skamma seg, tá hann sigur, at tað verður ógjørligt at fíggja fólkapensjónina í framtíðini, tá hann sjálvur júst hevur fingið játtað eina sera stóra fólkapensjón. Eisini onnur fakfelagsfólk vísa á hetta sama.

Tað, sum fakfeløgini nú bíða eftir er, at tey fáa uppskotið til hoyringar. Málið hevur verið uppi og vent á landsstýrisfundi, men ætlanin er at viðgera málið á einum fundi fyri seg. sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

Í Býin

Manhattan PUB & CAFÉ
Livandi tónleikur
Robert McBirnie
spælur
í vikuskiftinum
Manhattan PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

Í Býin - hvønn hósdag

Leygarkvøldið 6. oktober
Dansikvøld
Matskrá
Fø. Skeljar
Fø. Lambskjøt
Dessert
Kostnaður fyri 3 rættir
kr. 225,-
Til dansin spæla Fimmbogi Lisberg & Vinmenn
kr. 80,-
Borðbílegging á tlf. 31 75 00
Hotel Føroyar

Í Býin
- hvønn hósdag



Í Býin

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 5. oktober
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 6. oktober
• Sjavskapping opið frá kl. 19.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
Fróði skipar fyri

fk Matseðilin
Hósdagin 4. okt.: Karrygrýta
Fríggjadagin 5. okt.: Hamburgararyggur
Leygardagin 6. okt.: Beef-steak
Mánadagin 8. okt.: Medistarpylsa
Týsdagin 9. okt.: Millíónbúff
Mikudagin 10. okt.: Stokt flak
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið spæla
MOON-SHOT
www.kaggin.fo

HESA VIKUNA
Hóskvøldið
DJ Tummas Gudmundsen
Fríggjakvøldið
ladies night
DJ Tummas Gudmundsen
Leygarkvøldið
DJ Marjon Petersen
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Strendur
Leygarkvøldið:
• Tórsh.-Strend. kl. 21.45
• Strend.-Tórsh. kl. 23.00
• Tórsh.-Strend. kl. 04.30 frá City
(Steðga verður við steðgiplássini hjá bussleiðini og bygdaleiðir á vegnum aftur og fram)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Bussarnir:
Tlf. 287752

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Vestmanna
Leygarkvøldið :
• Vestm.-Tórsh. kl. 20.50
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 24.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30 frá City
(Koyrt verður um Kvívík)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Bussarnir:
Tlf. 286254

Klubbadansur
Leygarkvøldið
6. okt.
DRIV
spælir
HK Havnar Klubbi

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
Bergmenn
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Nú fleiri ódyrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

AUTO
-Dag sum nátt- -skjótt og gott-
-ALT DØGNIÐ-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
Skal tú bil hýra -so er tað 311234
AUTO
311234

Í Býin

www.sosialurin.fo

Í Býin - hvønn hósdag

Á matarseðlinum
Suppa og breyð 35,-
Sandwich Baguette
kylling & bacon: karry dressing, salat og tomat 45,-
ost & skinka: miracel whip, tomat og bacon 45,-
ost & kalkun: miracle whip, tomat og bacon 45,-
Lasagna v/oksakjøt 49,-
Pitabreyð v/oksakjøt 49,-
v/tunsalat 49,-
Hóskvøldið
Kristianna & Herluf
Fríggjakvøldið
Eivør Pálsdóttir Band
Leygarkvøldið
Malan Eyðunsdóttir Band
livandi tónleikur
Café Natúr
Tlf. 31 26 25